Sjúkrasystrarnar á B6:

# Knívin í ryggin

**Fyri nøkrum árum síðani løgdu sjúkrasystrarnar á Landssjúkrahúsinum niður arbeiðið fyri at fáa ein sokallaðan røktarstjóra. Hetta varð gjørt, tí at sjúkrasystrarnar vildu hava eitt umboð í leiðsluni á Landssjúkrahúsinum. Sjúkrasystrarnar eru vónbrotnar nú røktarstjórin sigur, at tað eru nóg mikið av sjúkrasystrum á B6**

SJÚKRAHÚSTRÆTAN
*Ingrid Bjarnastein*

Arbeiðið varð niðurlagt fyri at fáa ein røktarstjóra, sum kundi umboða sjúkrasystrarnar í leiðsluni á Landssjúkrahúsinum. Sjúkrasystrarnar hildu, at tær høvdu eins nógv brúk fyri einum røktarstjóra, sum læknarnir hava brúk fyri einum læknastjóra. Fyri at staðfesta teirra misnøgd, løgdu tær niður arbeiðið, og ynski teirra um røktarstjóra kom eisini ígjøgnum.

Fyri góðum hálvum øðrum ári síðani varð Marin Vang sett í starv sum nýggjur røktarstjóri á Landssjúkrahúsinum. Marin Vang hevur fleiri ferðir sagt við fjølmiðlarnar, at hon heldur, at tað eru nóg mikið av sjúkrasystrum á B6.

Men hvat siga sjúkraystrarnar til hetta úttalilsið?

– Tað er sum at fáa knívin í ryggin, sigur Ingun Gaardbo, talskvinna fyri sjúkrasystrarnar á B6.

– Tá verkfallið var fyri nøkrum árum síðani, var tað fyri at vit kundu fáa eitt umboð í ovastu leiðsluna, og tað fingu vit. Tá Marin Vang so nú sigur, at hon heldur, at tað eru nóg mikið av sjúkrasystrum kann man róliga siga, at hetta er sum at verða stungin í bakið.



*Sjúkrasystrarnar á B6 siga, at tað er sum at fáa knívin í ryggin av røktarstjóranum, ið sigur, at nóg mikið av sjúkrasystrum eru á deildini*

Marin Vang, røktarstjóri:

# Eg umboði onnur enn sjúkrasystrarnar

**– Eg umboði ikki bert sjúkrasystrarnar. Umframt sjúkrasystrarnar umboði eg aðrar bólkar í sjúkrahúsrøktini, tað vil siga røktarar, atstøðingar og onnur. Ábyrgdin hjá mær er at grundgeva fyri, at tænastustøði í sjúkrahúsrøktini er nøktandi, sigur Marin Vang, røktarstjóri á Landssjúkrahúsinum**

SJÚKRAHÚSTRÆTAN
*Ingrid Bjarnastein*



*Marin Vang, røktarstjóri á Landssjúkrahúsinum, sigur, at hon er umboð fyri onnur enn sjúkrasystrarnar.*

Marin Vang, røktarstjóri á Landssjúkrahúsinum, vil sjálv ikki kalla seg umboð sjúkrasystranna. Men heldur Marin Vang sjálv, at hon hevur vent sjúkrasystrunum, sum fóru í verkfall røktarstjórans vegna, baki?

– Nei, tað haldi eg ikki, sigur Marin Vang.

– Tað er als ikki hetta, málið snýr seg um. Hetta snýr seg um ein konstruktivan og opnan dialog. Eg eri ikki pliktað til at ganga øllum krøvunum, sjúkrasystrarnar koma við á møti. Eg skal lurta eftir tí, tær hava at siga og síðani fara sakliga víðari við málinum, sum skal vera væl grundað. Man kann kanska kalla meg álítisumboð hjá sjúkrasystrunum.

– Men í síðsta enda er tað deildarsjúkrasystirin, sum er umboð sjúkrasystranna. Fyrr var tað soleiðis, at tað var fyristøðukvinnan, ið var umboð fyri sjúkrasystrar. Men í dag hava vit deildarsjúkrasystir, yvirsjúkrasystir, røktarstjóra og í toppinum sjúkrahúsleiðsluna, sigur Marin Vang víðari.

– Eg umboði ikki bert sjúkrasystrarnar. Umframt sjúkrasystrarnar umboði eg aðrar bólkar í sjúkrahúsrøktini, tað vil siga pleygarar, assistentar og onnur. Ábyrgdin hjá mær er at grundgeva fyri, at tænastustøðið í sjúkrahúsrøktini er nøktandi, sigur røktarstjórin.

### Ikki hennara arbeiði

Í starvslýsingini hjá røktarstjóranum stendur millum annað, at røktarstjórin skal:

- Samskipa sjúkrarøktarfakliga økið
- Kunna um uppgávur sum viðvíkja sjúkrarøktini, herundir samskipan av sjúkrarøktarfakligu menningini
- Meting av tilfeingisnýtsluni innan sjúkrarøktafakliga økið
- Seta mál fyri sjúkrarøktarfakligari menning
- Gerð av leiðreglum innan sjúkrarøktina
- Góðskutrygging- og menning av sjúkrarøktini
- Útbúgving og eftirútbúgving av sjúkrarøktarstarvsfólki
- Meting av fakliga førleikanum hjá starvsfólkum innan sjúkrarøkt

Umframt hetta hevur røktarstjórin yvirordnaðu samskipanina á tí røktarfakliga økinum.

Marin Vang sigur, at hennara arbeiði er at meta um alt tilfeingið verður nýtt á rættan hátt. Men tá alt kemur til alt, er tað sjúkrahúsleiðslan, sum hevur ábyrgdina av, at alt verður ráðiliga drivið.

Sjúkrahúsleiðslan:

# Tikið støðið á veikum grundarlag

**Leiðslan á Landssjúkrahúsinum hevur sagt, at tað er ikki nóg væl skjalprógvað, at tað eru ov fáar sjúkrasystrar á B6. Men um málið ikki er nóg væl skjalprógvað, so reisa vit spurningin: Hvussu kann leiðslan so úttala seg um eitt mál, ið ikki er nóg væl skjalprógvað?**

SJÚKRAHÚSTRÆTAN
*Ingrid Bjarnastein*



*Sjúkrahúsleiðslan sigur, at tað er ikki nóg væl skjalprógvað, at ov fáar sjúkrasystrar starvast á B6*

Røktarstjórin játtar og heldur samstundis fast við at tað eru nóg mikið av sjúkrasystrum á B6.

– Vit í leiðsluni hava, síðani ósemjan hevur stungið seg upp, ikki havt nakran møguleika at siga nakað annað. Frá tí at kreppan byrjaði til nú hevur ikki verið tíð til at gera eitt analyserað arbeiði, har man metir um aktivitetin á deildini, ella analyserar støðið á røktini.

Hevði leiðslan skula gjørt eina væl analyseraða meting av deildini hevði hon verið noydd at gjørt eina sokallaða røktartyngdarmeting. Hetta vil siga, at ein hevði verið noyddur at mátað tyngdina á hvørjum einasta sjúklingi, og býtt hann upp í bólkar. Her er talan tó ikki um kropstyngd! Bólkarnir, sum landssjúkrahúsið hevur at býta upp í, eru talsettir frá 1 – 4. Har merkir eitt, at sjúklingurin er sjálvhjálpin, og fýra merkir, at hann skal hava hjálp til alt.

Sambært Marina Vang er tað ikki nóg væl skjalprógvað, at tað eru ov fáar sjúkrasystrar. Leiðslan hevur bjóðað sær at koma inn á deildina og kanna málið, soleiðis at tey kunnu hyggja, hvussu tað sær út, og so harafturat møguliga fáa ein objektivan persón inn at hyggja. Leiðslan hevur ikki havt tíð at finna útav, um hesir pástandir eru sannir. Men hvussu kann leiðslan so úttala seg um deildina, tá arbeiðið ikki er nóg væl skjalprógvað at gera ein meting?

– Skjølini, leiðslan hevur tikið støði í, er seingjartalið. Síðani hava vit verið inni og samanborið við aðrar medisinskar deildir. Útfrá hesum hava vit so sett normeringina uppá 18 seingjarpláss, og her hava vit eisini skorið hana niður frá 24. Hetta er eitt miðal tal fyri normeringar, og hildu vit hetta vera passandi.

### Talið veksur ikki

Tølini á sjúklingum á B6 vísa, at har er ikki vøkstur í. Har er ongin vøkstur í aktiviteti heldur.

– Tungir og røktarkrevjandi sjúklingar koma tað altíð at vera, sigur Marin Vang.

– Men so leingi sum onki er kannað, kunnu vit ikki gera nakað annað. Deildin hevur annars fingið játtað eyka pening í ár, harafturat meira enn nøkur onnur deild her á sjúkrahúsinum.

Sjúkrasystrarnar á B6 hava eisini gjørt vart við, at tólini á deildini als ikki er nóg góð, men slitin og vánalig at arbeiða við.

– Tað er ein samd sjúkrahúsleiðsla, sum sigur, at sjálvandi skal hetta broytast. Vit hava gjørt eina útskiftingarætlan har ætlanin er at skifta alt út. Borð, stólar, sengur og so framvegis. Men hetta fáa vit ikki gjørt alt í senn, men hetta má koma so við og við, tí annað er ikki peningur til, sigur Marin Vang.






# Stórt sangtiltak á Giljanesi

**Árliga jólasangløtan í Vágum verður í ítróttarhølini á Giljanesi í morgin. Umleið hálvttriðjahundrað sangarar fara á pall samstundis**

SANGLØTA
*Edvard Joensen*



*Børnini hava vant í Missiónshúsinum í Sørvági upp undir jólasangløtuna, sum verður sunnudagin*

*Mynd: Edvard Joensen*

Sunnudagin klokkan 15.00 verður árliga jólasangløtan í Vágum. Hon verður í ár hildin í ítróttarhøllini á Giljanesi, sum er einasta hølið í oynni, ið kann hýsa øllum luttakarunum, sigur ein av fyrireikarunum, Marni av Kák.

Tað verða nógv fólk við í tiltakinum, greiðir hann frá. Umleið 10 prosent av samlaða íbúgvaratalinum í Vágum far at luttaka, sigur hann. Hann metir, at tá felagskórið fer á pallin, verða 240 sangarar við.

Talan er um eitt felags tiltak hjá øllum kristiligum samkomum í oynni. Heimamissiónin, Brøðrasamkoman og samkoman Filadelfia eru umboðað.

Kórini eru nógv. Fýra barnakór við sunnudagsskúlabørnum hjá Heimamissiónini úr Sandavági, Miðvági og Sørvági eru við, umframt eitt barnakór við sunnudagsskúlabørnum úr Kedron, sum er salur hjá Brøðrasamkomuni. Hesi børnini eru tilsamans umleið 170 í tali.

Av øðrum kórum eru at nevna Streingjakórið, sum hevur fólk úr allari oynni. Tað sama er við ungdómskórinum og manskórinum, sum eisini eru umboðað allastaðni úr Vágum uttan úr Gásadali, greiðir Marni av Kák frá. Teir vaksnu sangararnir eru umleið 70 í tali.

Tað, sum sungið verður, verða mest teir vanligu, góðu, gomlu jólasangirnir, sum fólk kenna. Men eisini verður okkurt av nýggjari gospelsangi við. Og so verður eisini felagssangur, har øll, sum koma at lurta, eisini sleppa at syngja kendar jólasangir. Til felagssangin fer Sørvágs Tónleikarafelag at spæla.

Umframt sangin verður eisini upplestur av jólaboðskapinum. Tað verða deknar úr Vágum, eins og fólk úr teimum ymsu samkomunum, sum fara at lesa, sigur Marni av Kák.

Hann sigur, at tiltakið í ár er tað tíggjunda í røðini av sínum slagi, og varð tí valt at gera eitt sindur meira burtur úr enn vanligt. Vanliga hevur sangløtan verið hildin í Missiónshúsinum í Sørvági. Men hesaferð gjørdist tað sum í tilhaldshúsunum í Betlehem, at ikki var hugsingur um at hýsa øllum, sum luttaka.

Og jólasangløtan á Giljanesi er eitt veruligt jólatiltak, leggur Marni av Kák afturat. Tað kostar einki at koma at lurta og syngja við.



# Teir tóku land 6

## - føroyingar í Grønlandi

Føroyingar í Grønlandi vágaðu lívið. Í 1963 stóðu 24 lík undir børu samstundis í Føroyingahavnini, tá týski trolarin München sakk á veg heim við fullari last. Sama árið fór Blikur at leka í ísinum á Kappanum, og 40 føroyingar noyddust í bjargingabátarnar. Hann sakk, men ein týskur trolari tók menninar upp. Manningin noyddist eisini av skonnartini »Tinganesi«, sum rendi á ein flúr og sakk. Tíbetur kom Vesturvón teimum til hjálpar.




Sætta bókin í røðini Teir tóku land eftir Jógvan Arge ger burturúr sekstiárunum, tá fleiri túsund føroyingar fiskaðu í Grønlandi. Nordafar bygdi framkomið flakavirki í Føroyingahavnini, menn settu seg niður í Grátufjørðinum, og føroyingar bygdu eisini útróðrarhavn á Eggersoy, har sjálvur Kap Farvel er.
Í bókini er yvirlit yvir føroyskar útróðrarmenn í Grønlandi tey árini, tá virksemið var í hæddini. Bókin er 208 síður, prýdd við forvitnisligum myndum, tekningum og kortum

299,-

Jógvan Arge